# Koyriteknisk breyt í Føroyum???



TÍÐARGREININ
*Poul Hansen*

4. feb. 2010 var frágreiðing og tilmæli um koyritekniska breyt latið landsstýriskvinnuni í Innlendismálum.

Í fororðunum verður sagt *"at arbeiðisbólkurin fekk til uppgávu at kanna møguleikarnar at gera eina koyritekniska breyt í Føroyum"*

Í arbeiðissetninginum verður sagt, at arbeiðisbólkurin skal kanna, **hvar** ein møgulig koyriteknisk breyt kann leggjast o.s.fr.

Her fer arbeiðisuppgávan beinanvegin "av sporinum" tí sjálvandi skuldi arbeiðssetningurin í fyrsta lagi verið, um vit hava brúk fyri einari koyritekniskari breyt í Føroyum og í hvønn mun hon kann minka um ferðsluskaðarnar.

Við arbeiðissetninginum í álitinum verður sostatt lagt til grund, **at vit skulu hava eina koyritekniska breyt í Føroyum,** og álitið snýr seg tí einans um at kanna, hvar og hvussu stór hon skal vera, kostnaðarætlan, fígging, rakstur v.m.

Longu av hesari orsøk kann tilmæli ikki nýtast sum grundgeving fyri at gera eina breyt.



**Hava koyritekniskar breytir aðrastaðni minkað um skaðar í ferðsluni?**

Í álitinum s. 7 stendur **"at ongar ítøkiligar kanningar visa, at frálæra á koyritekniskari breyt minkar um talið á ferðsluvanlukkum og á deyðum í ferðsluni"**

Hóast hetta sigur bólkurin, at ***"yvirhøvur eru royndirnar av koyritekniskum breytum í grannalondunum jaligar".***

Hetta verður sagt, hóast tvær norskar frágreiðingar vísa neilig úrslit av koyritekniskum venjingum hjá royndum førarum!!!

***"Hálkuskeiðið førdi til, at hesir ungu menn høvdu minni virðing fyri hálkuni og størri trúgv á egnan førleika, við tí úrsliti, at talið av vanlukkum øktist",*** álitið s. 17.

Ein svensk kanning kom til tað úrslit, at størsti dentur skal leggjast á, at arbeiða miðvíst við hugburðinum, s. 18f.

Kostnaðurin at gera eina koyritekniska breyt

Arbeiðisbólkurin metir kostnaðin av at gera breytina millum 29 og 35 mill. kr. uttan mvg. Hetta er grundað á eitt gamalt projekt frá 1992, s. 7.

Um breytin verður løgd í Saksunardali, er einki lagt upp fyri, at vegurin gjøgnum Hvalvík og Saksunardal til hálkubreytina skal broytast/breiðkast ella enntá leggjast oman fyri bygdina, so her kunnu beinanvegin leggjast 30 – 50 mill. kr. afturat kostnaðinum.

Bólkurin mælir til, at íløgan verður fíggjað við játtan á fíggjarlógini.

**Raksturin av breytini**

Her mælir bólkurin til, at kostnaðurin av at nýta tilboðini hjá breytini verður ásettur soleiðis, at raksturin ber seg fíggjarliga og sostatt hvílur í sær sjálvum, s. 8.

Hetta ætlar bólkurin skal fíggjast við gjaldi frá:

1. teimum, ið taka koyrikortið fyrstu ferð
2. eftirútbúgving av bilførarum hjá landinum, kommununum, statinum og vinnufyritøkum
3. eldri bilførarum, har umhugsast skal, at slík skeið verða lógarkravd.

Kostnaðurin verður ásettur soleiðis, at koyritekniska økið fær møguleika at bera seg fíggjarliga, s. 29.

Við vanligum menniskjaorðum merkir hetta, at kostnaðurin av koyrikortinum hjá teimum ungu, sum er nóg dýrt frammanundan – dýrkar kr. 3-5000,00 fyri hvønn.

Harumframt skulu øll, sum frammanundan hava koyrikort – um neyðugt við lóg – áleggjast at taka og gjalda kr. 3–5.000,00 fyri hálkubreytarskeið.

Hetta skal gerast einans fyri at gjalda raksturin av koyriteknisku breytini.

Smb. álitinum s. 9 skulu gjøldini ásetast soleiðis, at breytin ber seg fíggjarliga.

Endamálið við breytini er sostatt bert at gera breytina fyri síðani at áleggja bilførarunum eitt gjald fyri eina tænastu, sum einans verður ásett fyri at bera raksturin av einari óneyðugari almennari íløgu.

**Hagtølini** yvir ferðsluóhapp – vanlukkur standa á s. 42 og eru frá 1991-2000!!! t.v.s. at hagtølini eru 10 – 20 ára gomul.

Har eru eingi hagtøl um hvørji óhapp/vanlukkur eru hend í hálku ella um rúsdrekka, ov nógv ferð, ella ov slitin dekk v.m. vóru ella kundu vera ein orsøk til óhappið/vanlukkuna.

**Tilmælið**
**Til landsstýriskvinnuna**

Legg álitið í niðastu skuffu og gloym tað.

**Fyrimunir:** Landskassin sparir 29-35 mill. umframt vegin 30 – 50 mill. kr. (mín meting ).

Tey ungu sleppa undan eykaútreiðslum kr. 3-5.000,00 tá koyrikortið verður tikið.

Allir bilførarir verða spardir fyri lógarkravdum hálkuskeiðum, sum fara at kosta kr. 3-5.000,00 hvørja ferð.

Títtleikin av hesum skeiðum verður ásettur soleiðis, at raksturin hongur saman.

Saksunardalur verður ikki oyðilagdur á hesum sinni.

**Vansir:**
Eingir

Tíðargreinin

---

um lítla land okkara so vita vit at eini 7 oyggjar nokso lættliga kunnu knýtast saman við meginøki um oyggjatunnlar. Tað kostar, men sum tíðin líður spara vit tað innaftur við spardum ferjuútreiðslum.

Soleiðis kunnu vit eisini vaksa um landið.

"Bygdamenningin" verður á einum øðrum og hægri støði.

Vit eru so mikið fá at vit einans kunnu megna at hava ein veruligan kraftdepil í landinum. Og hann má vera sentralt.

Knýta vit landið saman við oyggjatunnlum eru vit munandi nærri hvør øðrum enn tey ið búgva í eitt nú London, Keypmannahavn ella New York.

Man ikki vera samhaldsfastari og skilabetri at knýta Hest, Sandoy, Skúgvi, Dímun og Suðuroy í meginøkið áðrenn farið verður undir Skálafjarðartunnilin?

Og eiga vit ikki eisini at fáa Svínoy og Fugloy og kanska aðrar oyggjar "uppí" Føroyar?

Eigur Løgtingið ikki at samtykkja eina stóra víðsjóna ætlan har vit knýta landið saman og vaksa um lítla land okkara? Og eiga vit ikki at gera tað samhaldsfast?

Eins og føgru sjónirnar um SEV fyri seksti árum síðani? Og eins og vegakervið er útbygt síðani LANDIÐ, við Mikkjal Helmsdal og góðum fólki veruliga fór til verka í fimmtiárunum?

Hetta loysir seg sum tíðin líðir í spardum ferjuútreiðlum umframt hópin av øðrum fyrimunum.

Men um Løgtingið samtykkir at Skálafjarðartunnilin skal gerast fyrst, so ynski eg inniliga fyri føroyska samfelagið at hann verður framdur so optimalt sum møguligt.



*Ætlaður longdarskurður*